
Mynd: Solo Oil

# Oljufeløg halda seg hava funnið oljurisa beint við flogvøll

**Jógvan Hugo Gardar**

12.04.2015 - 15:50

Oljan.fo

Tvey smá bretsk oljufeløg, sokallaðir oljumýggjabitar, hava funnið olju nærhendis Gatwick-flogvøllinum. Hetta skriva fleiri bretskir miðlar.

Talan er um oljufeløgini UK Oil & Gas og Solo Oil, sum skulu hava funnið olju á økinum sum kallast Weald, og talan er um olju sum er funnin á landi.

- Vit halda okkum at hava funnð rættuliga fitt av olju. Hetta sær út til at vera størsta oljufundið á bretska meginladinum seinastu 30 árini, og hetta kemur at hava nógv at týða fyri Bretland, sigur stjórin í UKOG, Stephen Sanderson, sambært BBC.

Talan skal vera um olju sum er funnin í flágum sum minna um har ein finnur skiferolju. Tað merkir at helst kan ein ikki brúka meir enn millum fimm og fimtan prosent av oljuni sum er funnin.

Hinvegin, so skal talan vera um eitt risafund, sum hesi bæði oljufeløgini hava funnið. Sambært Sanderson halda tey seg hava funnið millum 50 og 100 milliardir føt av olju á hesi leiðini.

- Tað merkir at vit einsamøll kunnu framleiða millum tíggju og 30 prosent av oljuni sum Stórabretland hevur brúk fyri í 2030, sigur Sanderson.

Um metingarnar halda, so kann hetta oljuøkið framleiða millum fimm og 15 milliardir føt av olju. Til samanberingar roknar Statoil við at kunnu fáa eini 1,7 til tríggjar milliardir føt burturúr sínum risa, Sverdrup-økinum.

Fleiri hava verið sera ivasom til tíðinfdini frá UKOG og Solo Oil, tí metingar hava fyrr sagt at her kann vera olja sum svarar til millum 2,2 og 8,5 milliardir føt av olju. Tí eru fleiri sum eru í iva um talan kann vera um eitt so stórt fund.